# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



**Býráðsfundur mikudagin 31. oktober 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.15**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **16/00350**<br>**Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 254 at leggja saman við matr. nr. 273 í Leirvík til ummælis**<br>Umsøkjari ynkir at selja part av matr. nr. 254 stødd 41 fermetrar, sum skal leggjast afturat matr. nr. 273 í Leirvík. Matrikulin er framvið Kráarvegnum.<br><br>Umsitingin mælir frá at viðmæla sundurbýti av matr nr. 254 sambært umsókn.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at viðmæla umsóknini um sundurbýti og upplýsa keypara at økið hevur áseting H. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.<br><br>*Hanna Jensen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.* |
| 2. | **15/00189**<br>**Broyting í byggisamtyktini fyri matr. nr. 86a í Norðragøtu**<br>Búnaðarstovan kann ikki fremja sundurbýti av matr. nr. 86a í Norðragøtu fyrr enn byggisamtyktin er broytt frá áseting H (frílendi) til áseting J (landbúnaðarjørð).<br><br>Umsitingin mælir til at byggisamtyktin verður broytt frá áseting H (Frílendi) til áseting J (landbúnaðarøki)<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at gera broyting í byggisamtyktini, at broyta áseting fyri matr. nr. 86a í Norðragøtu frá áseting H til áseting J, landbúnaðarjørð. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. |
| 3. | **16/00334**<br>**Umsókn um keyp av lendi matr. nr. 320 og 321 í Syðrugøtu**<br>Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um keyp av matr. nr. 320 og 321 at leggja til matr. nr. 182 í Syðrugøtu.<br><br>Umsitingin mælir til at ganga umsóknini á møti og selja matr. nr. 320 og 321 | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini. |

**Býráðsfundur mikudagin 31. oktober 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.15**

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at selja matr. nr. 321 og at stykkið verður lagt til matr. nr. 182.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**4. 16/00359**

**Kunningarstova í Eysturkommunu**

Eysturkommuna rindar hvørt ár samanalagt 60.000,00 kr. til "Ferðavinnan í Eystuoy".

Tað eru møguleikar at hava kunningarstovu í nýggja býráðshúsinum. Ein roynd kundi verið gjørd summarið 2017

Mentanarnevndin og vinnunevndin mæla til Eysturkommuna frá 1. januar 2017 steðgar gjaldinum til "Ferðavinnan í Eysturoynn, og at umsitingin arbeiðir víðari við møguleikanum um at hava eina kunningarstovu í nýggja býráðshúsinum næsta summar.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini, vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**5. 16/00380**

**Eykajáttan til keyp av brandbili**

Av tí at ymisk eykaútgerð v.m manglaði tá bilurin var keyptur, umframt at kommunan má rinda part av meirvirðisgjaldinum kemur samlaði kostnaðurin av bilinum at verða 218.423,00 hægri enn játtan.
Tískil verður biðið um eykajáttan til hetta.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan á 218.500,00 kr., og at peningurin verður tikin av konto. 7.31.11.511-10 (Nýggj brunastøð)

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Tollakur Joensen, Árni Jacobsen, Hanna Jensen, Brandur Jacobsen.

**Atkvøður ímóti:**
Oluffa Joensen

**6. 16/00383**

**Umsókn frá Hoyma um stuðul**

Umsókn frá HOYMA um stuðul til at skipa fyri morgunmati og tiltaki í gomlu bygdini í Norðragøtu.

Einmælt samtykt at Eysturkommuna bjóðar morgunmat og til tiltøkini í gomlu bygdini í Norðragøtu.

**Býráðsfundur mikudagin 31. oktober 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.15**

Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul á 60.000,00 kr., og at peningurin verður funnin á verandi fíggjarætlan.

*Oluffa Joensen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________

Hanus Jacobsen ______________________

Hjalti Dalheim ______________________

Oluffa Joensen ______________________

Brandur Jacobsen ______________________

Emma Rasmussen ______________________

Tollakur Joensen ______________________

Hanna Jensen ______________________

Árni Jacobsen ______________________